ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hon hevur upplivað søguna, og tað eru fáir studentar, sum hava tann fyrimunin*

*(lærari hjá Nola Ocha)*

# Nú stendur nógv á honum

**Eitt higartil ókent skjal herðir trýstið á stjóran í Heimsbankanum og kravið um, at hann eigur at fara frá**



*Paul Wolfowitz noyðist helst at leggja frá sær sum heimsbankastjóri*

Stjórin í Heimsbankanum, Paul Wolfowitz, hevur verið í trongum skóm ta seinastu vikuna, og líkt er til, at teir treingjast í hvørjum.

Í gjár kom fram, at eitt skjal, sum júst er komið undan kavi, ger støðu hansara uppaftur verri. Skjalið hevur varastjórin í Heimsbankanum, Xavier Coll, skrivað, og har umrøður hann ein fund, sum hann hevði við Paul Wolfowitz í juli í fjør. Í skjalinum sæst, at teir millum annað hava umrøtt møguleikarnar fyri at halda lønarviðurskiftini hjá teimum, sum arbeiða í bankanum, loynilig.

Hetta kann koma Paul Wolfowitz stak illa við, og sambært amerikonskum fjølmiðlum bendir nógv á, at Wolfowitz ætlaði at fjala lønarhækkingina hjá vinkonuni. Tað er longu avdúkað, at hann gav vinkonu síni eina stóra lønarhækking, tá hann tók við sum stjóri í Heimsbankanum í 2005. Vinkonan arbeiddi har frammanundan.

Málið um lønina hjá vinkonuni hevur fingið fleiri lond at krevja, at Paul Wolfowitz skal leggja frá sær sum stjóri í Heimabankanum, og hann hevur fingið somu áheitan frá starvsfólkunum í bankanum. Hinvegin hevur USA ikki funnist at honum. Paul Wolfowitz var amerikanskur varaverjumálaráðharrin, til George W. Bush tilnevndi hann stjóra í Heimsbankanum.

## Sjáldsamur vestur

Tann 16. mai verður ein sjáldsamur bjargingarvestur seldur á uppboðssøluni Christie's í London. Talan er um ein bjargingarvest hjá einari kvinnu, sum var við ferðamannaskipinum "Titanic" vanlukkutúrin í 1912. Søgan sigur í hvussu er, at Mabel Francatelli hevði bjargingarvestin uppi á sær, og at hann bjargaði lívi hennara, tá "Titanic" sakk stutt eftir midnátt tann 15. apríl í 1912. Tað er eitt sindur óvist, hvat bjargingarvesturin er verdur, men serkøn halda, at boðið kann koma upp ímóti umleið 900.000 krónum.

# Heimsins elsti studentur



*Gongst sum ætlað kann tann 95 ára gamla Nola Ocha úr amerikanska statinum Kansas kalla seg søgufrøðing tann 12. mai. Tá verður hon liðug við próvtøkuna á Fort Hays State University. Nola Ocha var bóndakona í mong ár, og tá maður hennara doyði í 1972, byrjaði hon at taka ymisk skeið í søgu, og 12. mai verður hon elsta fólk, sum endar útbúgving á lærdum háskúla. Verandi met eigur Mozella Richardson. Hon tók útbúgving sum tíðindafólk í 2004. Tá var hon 90*

STUTT SAGT

## Hvassorðaðar ábreiðslur

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, og verjumálaráðharrin, Amir Perez, fáa av at vita í einari fyribilsfrágreiðing, sum ein kanningarnevnd hevur skrivað um kríggið millum Ísrael og Hizbollah seinasta summar. Fyribilsfrágreiðingin snýr seg um seks teir fyrstu dagarnar í krígnum, og sagt verður, at Ehud Olmert gjørdi av at fara í kríggj uttan at seta sær nakað ávíst má við krígnuml. Nevndin sigur eisini, at hann gjørdi fleiri onnur mistøk. Kanningarnevndin fýlist á, at Amir Perez gjørdi eftir tilmælum frá teimum hernaðarligu leiðarunum uttan at seta spurnartekin við, um teir høvdu rætt. Hóast atfinningarnar heldur kanningarnevndin ikki, at Olmert og Perez eiga at leggja frá sær. Ísraelski herovastin, Dan Halutz, legði frá sær í januar orsakað av atfinningunum í sambandi við kríggið seinasta summar.

**Írar á val**

Írar skulu á val í næsta mánað. Bertie Ahern, forsætisráðharri, boðaði í gjár frá, at hann hevur gjørt av at halda tjóðartingsval innan 30 dagar. Samstundis kunngjørdi hann, at hann hevði biðið Mary McAleese, forseta upploysa tjóðartingið í Dublin, og at forsetin hevði gingið áheitan hansara á møti. Tað er ikki heilt greitt, nær valið verður, men 24. mai hevur verið nevndur sum valdagur. Hetta er annað stjórnarskeiðið hjá Bertie Ahern.